## DAGSINS MEINING

# Ein nýggj byrjan

Avtalan millum oljufeløgini BP, Shell og Anadarko og føroyskar oljumyndugleikar um at flyta brunnar frá einum parti av landgrunninum og longur inn á landgrunnin er einki minni enn ein nýggj byrjan í oljuleiting við Føroyar.

Vit minnast øll, hvussu gekst við teimum fyrstu fýra brunnunum. Hesir prógvaðu eina virkna kolvetnisskipan men so heldur ikki meira. Oljufeløgini mettu tí, at lítið og einki var at fara eftir í sokallaða "Gullhorninum" og hava tí í eina tíð arbeitt við eini ætlan at flyta restandi fýra brunnarnar longur inn á landgrunnin, har møgulig oljuløg eru fjald av tjúkkum basaltfláum. Av tí at tað er meira kostnaðarmikið at bora inni á basaltinum, og váðin tí eisini verður størri, hevur verið tingast um at leggja teir fýra brunnarnar saman til tveir.

Nú er so komið undir land við tí fyrstu verkætlanini og avgjørt er at flyta teir báðar brunnarnar, sum BP og Shell hava bundið seg til at bora frá einum seks ára loyvi og inn á eitt níggju ára loyvi, sum oljufelagið Anadarko stendur fyri. Alternativið til hesa ætlanini hevði møguliga verið als ikki at bora írestandi brunnarnar men heldur goldið landskassanum pengarnar fyri tað, sum hesir brunnar høvdu kostað. Tvs. einar 300 til 400 mill. kr. Tað hevði sjálvandi komið væl við hjá landskassanum, men tað hevði so ikki gagnað leitingini. Við nýggju avtaluni um at bora ein brunn í 2007 verður so hildið fram við oljuleitingini og hol verður sett á eitt heilt nýtt og ókent øki á Føroyaleiðini.

Slík avtala er avgjørt eitt stig rætta vegin. Tað er ein sigur fyri Føroyar, fyri oljufeløgini og fyri oljuleitingina. Tað heldur gongd í ella rættari, tað setir ferð á hesa leiting og kann koma at fáa stóran týdning fyri komandi leitivirksemi á øllum landgrunninum í næstu framtíð. Roynd verður nýggj arbeiðsmodell, borað verður gjøgnum basalt á fyrstan sinni og ljóskastarin verður settur á eitt nýtt øki á landgrunninum. At hetta eisini liggur nærri landi er eisini áhugavert. Eisini er tað skilagott, at tú við slíkari ætlan fær fleiri oljufeløg at samstarva um at bora.

Í kjalarvørrinum á hesi ætlan verður so eftir øllum at døma gjørd líknandi avtala um ikki so langa tíð, har tveir aðrir brunnar, sum vórðu ætlaðir at bora í Gullhorninum, nú verða fluttir og lagdir saman aðrastaðni inni á landgrunninum. Og aftur her er talan um basaltøki. Har verða tað ikki minni enn 8 feløg við í verkætlanini við Statoil á odda. Hesin brunnurin verður eftir øllum at døma longu boraður í 2006. Bæði oljufeløg og føroyskir oljumyndugleikar eiga rós uppiborið fyri, at tað hevur eydnast at seta út í kortið á nýggjum og at fáa sett av tveir brunnar inni á landgrunninum, har eingin hevur borað áður. Hesir kunnu vera lykilin til eina nýggja tíð og kunnu koma at geva okkum svarið uppá, hvat veruliga goymir seg undir basaltinum. Tað kann so aftur vera ein katalysator fyri nógv annað leitivirksemi á Føroyaleiðini. Men miseydnast hesar báðar verkætlaninar kann tað eisini gera, at oljuleiting við Føroyar fær ein ordiligan frammaná, soleiðis at áhugin hjá umrøddu 10 oljufeløgum og øðrum við minkar ella verður eingin. Men tann, sum einki váðar, einki vinnur.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Søgan og fullveldisríki

**Jógvan Sundstein**



Formaður Sambandsflokksins hevur skrivað grein, sum hann nevnir: »Fullveldisríki fara í søguna«. Eg skilji greinina sum eitt slag av niðurstøðu frá hansara (Sambandsflokksins) síðu um, at vit føroyingar ikki skulu stríðast fyri fullveldi, men heldur tvørturímóti geva okkum undir aðrar felagsskapir. Helst skal tað skiljast soleiðis, at annar felagsskapurin, vit skulu viðurkenna er at verða partur av danska ríkinum, og hin er at vera partur av Europeiska samveldinum. So sleppa vit undan at hava ábyrgdina av einum føroyskum fullveldisríki, og tað skuldi eftir uppfatan sambandsformannsins ikki gjørt nakað, tí veruleikin í dag er, at einki fullveldisríki er til.

Men er veruleikin so einfaldur? Hyggja vit rundan um okkum í heiminum í dag eru um leið 200 lond, sum eftir vanligari uppfatan vera nevnd fullveldi. Tað vil siga, at tey eru politiskt sjálvstøðug og ráða sær sjálvum, hava suverinitet yvir egnum landaøki, og telja javnbjóðis øðrum sjálvstøðugum londum í alheims samanhangi. Harumframt finnast onnur lond og aðrar tjóðir, sum av ymiskum orsøkum ikki lúka hesar treytir. Í fleiri slíkum førum stríðast hesi fyri fullveldi og vóna at fáa tað sum frá líður.

Kaj Leo Johannesen roynir at føra ymisk prógv fyri, at einki land longur hevur fullveldi. Hann tekur sum dømi:

1. Gamla Sovjetsamveldi og tað, at hetta landi syndraðist
2. USA, álopið 11. september 2001 og gerð av missilskjøldri
3. Ísland og Noreg, sum umseta ES lógir og taka tær til sín

1. Eftir míni uppfatan er Sovjetsamveldi eitt tað besta dømi um, at tað er hættisligt at kúga fullveldisstrembanina. Hetta samveldi legði við makt fleiri lond undir seg og samveldi helt í stívliga 70 ár. So syndraðist tað og vit fingu í byrjanini av nítiárunum fleiri nýggj fullveldi. Tað er ymiskt, sum tað gongur hjá hesum londum, og vit síggja fleiri rembingar, men í øllum førum var kúganin ikki haldbar í longdini. Enn er kortini ikki komi á mál. Rusland hevur framvegis stórar trupulleikar við til dømis Tjetjenia og helst aðrar tjóðir eisini. Hetta vísir bara, hvussu stóran týdning fullveldi hevur framum at vera í einum óynsktum felagsskapi.
2. At fara at ivast í veruleikanum av einum virkandi fullveldi hjá USA haldi eg ikki nýtist at argumentera ímóti. Hetta stóra landi stríddi fyri at útvega sær fullveldi og fekk tað í 1776 og hevur fyri stóran part verið fyridømi fyri frælsar stjórnarskipanir aðrastaðni í heiminum. Landið stendur í dag sum fremsti verjari av demokratiska frælsinum, sjálvt um mótstøðan er stór, eisini frá summum, sum áttu at vita betur.
3. Ísland og Noreg. Hesi bæði londini hava bert eina søgu uppá 60 og 100 ár við fullkomnum fullveldi. Tað er helst ein partur av frágreiðingini um, hví tey ikki (enn) eru partur av ES. Tey hava ikki heilt gloymt, hvussu tað var fyrr, tá onnur lond tóku avgerðir teirra vegna. At tey royna at samarbeiða við bæði ES og onnur lond í heiminum vísir bert, hvussu vælvirkandi teirra fullveldi og stýrisformur annars er.

Kaj Leo Johannesen og Sambandsflokkurin stríðast fyri, at innlima Føroyar í danska ríkið, og at Føroyar skulu gerast partur av ES. Tað er sjálvandi teirra demokratiski rættur. Men at nýta argumentatiónina við, at eingi fullveldi og eingir nationalstatir eru til longur gongur ikki. Tvørturímóti eru fullveldi og nationalstaturin fortreytin fyri, at samarbeiðið millum lond kann virka. Tí kann eitt føroyskt samarbeiði svarandi til limaskap í ES bert virka, um vit gerast sjálvstøðugt land, tað vil siga fáa fullveldi við viðurkenning frá øðrum londum. Øll limalondini í ES eru sjálvstøðug, ja sjálvt Svend Auken vil hava donsku grundlógina broytta, soleiðis, at týðuliga kemur at standa, at Danmark er sjálvstøðugt og demokratiskt.

Men ikki fyrrenn land hevur fullt sjálvstýri kann avgerð takast um treytir viðvíkjandi felagsskapum og samarbeiði. Tað er ein stórur munur á hjá einum fólki og landi at arbeiða seg frá ósjálvstøðu til sjálvstøðu og frælsi, og at arbeiða við sjálvstøðuni sum grundarlag til eitt forpliktandi samarbeiði til frama fyri allar samarbeiðspartar.

At enda skal eg bert vísa á viðvíkjandi ES, at hesin felagsskapur sær út til at hava komið seg í stórar trupulleikar. Eitt er, at skrivstovuveldi er vorðið ovurhonds belastandi fyri limalondini. Annað er, at júst ov nógv frásigan av suveriniteti ger, at fólkið í fleiri londum ikki rættiliga er við longur. Tað sást á fólkaatkvøðunum í Fraklandi og Hollandi. Upptøkan av Turkalandi gevur nógvar trupulleikar, og í heila tikið víðkingin av felagsskapinum við nógvum nýggjum limalondum og ymiskum fólkasløgum við heilt ymiskum fortreytum ger, at stórur vandi er fyri, at felagsskapurin fer at syndrast aftur. Tað skal ikki undra meg, um ES um eini 20-30 ár dettur sundur líka sum Sovjetsamveldi gjørdi fyri 15 árum síðani.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.